


*Nr. 23* *11. november 2018* *78. árg.*

# Fórust uttan fyri Buenos Aires

*Óttast ikki, eg endurloysi teg; eg nevni teg við navni, tú ert mín. Gongur tú ígjøgnum vøtn, tá eri eg við tær, gjøgnum streymar, tá skola teir teg ikki burtur; gongur tú ígjøgnum eld, skal hann ikki brenna teg, og login ikki granda tær.*
*Jes. 43,1-2.*

Í gomlu sjómanskirkjuni í Buenos Aires, sum ikki verður nýtt longur, hekk ein málningur í forkirkjuni. Gomul sjófólk minnast hann helst enn. Motivið var eitt uppøst hav við einum søkkandi skipi. Eitt lýsandi menniskja kom gangandi eftir sjónum við naglamerktum hondum rættum út ímóti onkrum. Hetta nakað vóru tvær faldaðar hendur, sum rættu seg upp úr brótandi aldunum.

Málningurin boðar frá eini veruligari hending. Undir Fyrra Heimsbardaga varð eitt norskt skip torpederað uttan fyri argentinsku strondina. Manningin stríddist í tímar í aldunum. Hjá mongum kom bjargingin ov seint. Tey, sum vórðu bjargað, høvdu upplivað skakandi hendingar. Millum annað søgdu tey frá um ein ungan trúgvandi matrós, sum sakk í aldunum og druknaði. Men tað seinasta, tey sóu til hansara, vóru ikki armar, sum kavaðu í ræðslu. Tað seinasta tey sóu, vóru tvær faldaðar hendur rættar upp móti himli. Hetta er ein mynd, av okkara treisku vón. Um enn siglingin um lívsins hav endar við skipbroti og at enda við deyða, so kemur ein móti okkum á aldunum mitt sum far okkara fer undir. Ein sum uppdagar tær faldaðu hendurnar. Ein, sum kemur gangandi frá lívsins strondum fyri at leiða okkum inn hagar.

***Tá síðsti stormur er riðin av,***
***á ljósu strondum eg lendi,***
***tá skal eg skoða, hvat Harrin gav***
***til tey, sum aftur ei vendu;***
***ei nakar hugi tað skilja kundi,***
***ei nakað eyga tað síggja mundi,***
***hvat har hann hevur teimum goymt.***

# Jesus – hitt stóra ljósið

Eg eri so glaður, av tí at eg ein dagin sá ljósið, og tað stóra ljósið, Jesus Kristus, kom og lýsti upp mítt myrka hjarta, so at eg kundi gerast eitt ljósins barn. Tá spottaðu mínir fyrrverandi vinir meg og søgdu: „Nú hevur hann sæð ljósið." Og tað var júst tað, eg hevði sæð. Tað størsta av øllum ljósum – Jesus Kristus. Øll tey, sum fáa hann at síggja, fáa lív sítt broytt. Tey stíga úr myrkrinum og inn í ljósið.

Nú á døgum brúka tey ljósterapi, sum er eitt serligt ljós, sum skal grøða tunglyndi, sum fólk fáa ta myrku tíðina. Eisini eftirgjørt ljós rekur burtur myrkrið. Tá ið vit koma inn í eitt myrkt rúm, tendra vit bara, so hvørvur myrkrið av sær sjálvum. Tað fyrsta, Gud skapti, var ljósið: „Gud segði: „Verði ljós!" Og tað varð ljós. Og Gud sá, at ljósið var gott, og Gud skildi ljósið frá myrkrinum." (1. Mós. 1,3-4) Soleiðis fara eisini allar andaligar broytingar fram. Tá ið Jesus kemur inn í tað ringasta kriminella og grundaringa menniskjað, hendir broytingin.

Eg hoyrdi vitnisburðin hjá Kai Johannessen. Samfelagið hevði givið skarvin yvir. Kai skrivaði bókina „Det er for godt til å være sant". Sum 17 ára gamal fekk hann ein dóm upp á 8 ár fyri vápnað rán. Sálarfrøðingarnir søgdu honum, at hann var eitt vónleyst ólukkudýr. Men tá ið hann í Ila fongslinum boygdi knø og ákallaði Jesu navn, kom ljósið inn í hjarta hansara, og broytingin hendi. Jesus gjørdi tað, sum sálarfrøðingar, fongsulsverkið og onnur ikki kundu gera, nevniliga at tendra vónarinnar, trúarinnar og kærleikans ljós í hjartanum á Kai.

Hetta er ikki bara galdandi fyri Kai, men fyri øll, sum søkja ljósið. Myrkursins gerningar eru uttan um okkum alla tíðina, av tí at verðin liggur í tí ónda. Tí vit eru ikki kallað at banna myrkrið, men at tendra eitt ljós í myrkrinum.

Tá ið vit gerast mótleys og fáa tunglyndi, tá gerst alt myrkt, og vit gerast andaliga blind og liva í myrkrinum. Alt virkar vónleyst, og vit síggja bara myrkur, av tí at okkara tankar eru myrkir, tí vit dvølja við tað ónda, sum er komið yvir lív okkara. So kemur Guds orð og upplýsir okkum: „Títt orð er ein lykt fyri fóti mínum, eitt ljós á gøtu míni." Sálm. 119,105. „Opinbering orða tína íbirtir ljós, ger teir óroyndu vísar." Sálm. 119,130.

Hetta er jólanna stóri boðskapur til øll, sum liva í myrkri. Tað sanna ljósið er komið til jarðar, tað ber ljós inn í vónloysið. Ljósið ber eisini kærleika og hita, har myrkrið og kuldi ráða. Minst til, at tá ið ljósið verður tendrað, kemur hitin eisini. Jesus er tað stóra ljósið, sum rekur allan kulda burtur. „Enn skal hann fylla munn tín við látri og varrar tínar við fagnaðarsangi." Job. 8,21.

*Effie Campbell* umsetti.

# Gud hevur brúk fyri tær

Ein trúgvandi maður var vorðin krypil fyri lívið, og knappliga kendi hann seg sum eina ónyttu, eitt avlop allastaðni, hann kundi onki gera.

Ein dagin kom ein til hansara og segði: „Tú kundi skrivað til teirra, sum sita í fangahúsi, sungið fyri teimum, sum liggja sjúk, ella fyri teimum, sum eru í somu støðu sum tú."

Maðurin fór í holt við hetta. Hundraðtals brøv skrivaði hann, men fekk aldri nakað svar ella tekin um, at nakar legði í brøvini. Men knappliga ein dagin kom eitt bræv til hansara.

Brævið var skrivað av fangavaktaranum og ljóðaði soleiðis: „Mín harri, gerið so væl og skrivið á tjúkkari pappír, tí brøv tygara fara annars í lepar undri lestrinum, tí tey ganga rúm úr rúmi í fangahúsinum.

Tað var vorðið sum troyst at fáa.

Bíblian talar nakað um, at tá ið tit gera tað, sum gott er, so troyttist ikki. Kanska at tú, sum lesur hetta, heldur, at ongin hevur brúk fyri tær; men ver vísur í, at tað er brúk fyri tær; kanska at tú ikki kanst skriva so mong brøv, sum hesin áðurnevndi ella syngja fyri øðrum, men eitt er vist: Gud gav tær tvær hendur, sum tú kanst halda saman í bøn, ja, um hann so tók aðra ella báðar, so hevur hann brúk fyri tær til at biðja

fyri menniskjum á tínum vegi, sjálvt um tú ikki kanst halda saman hendur.

Undarligt at vita, at Gud hevur brúk fyri mær og fyri tær, sum nú lesur hetta. Tá verður spurningurin: Vilja vit bera Gudi molarnar, so at hann kann vælsigna teir bæði fyri okkum sjálvi og fyri øðrum menniskjum?

*A.J.*

# Blás og liv

Ein maður, sum livdi av at skemta, gjørdist kendur fyri at vera sera hittinorðaður. Tá ið hann fylti níti, gjørdu familjan, vinir og kenningar av at halda eina veitslu fyri honum. Sjálvandi fekk hann eisini vanliga spurningin: „Hvør er orsøkin til, at tú ert vorðin so gamal?“

Uttan drál kom knappa svarið: „Blástur.
Tað er onki at tosa um. Uttan blástur, onki lív.“

At blása og at anda er tað sama. Áhugavert er, at Bíblian nýtir sama orðið fyri blástur, at anda og ein andi. Tann vísi Job segði: „Andi Guds hevur skapað meg, andablástur hins alvalda gevur mær lív.“ (Job 33,4). Og Paulus leggur afturat: „Tí at hann sjálvur gevur øllum lív og anda og allar lutir.“ (Aps.17,25). Tí sigur skriftin: „Alt, ið andadrátt hevur, Harranum lovi! Halleluja! Halleluja!“ (Sálmur 150,6).

---

Jesus satsar upp á fótfólkið og hevur givið okkum boð um at gera øll fólkasløg til hansara lærusveinar.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 11. nov. | Tekstur: 1. Mós. 1,1-2, 4; | bíbliuorð: Sl. 33,6 |
| 18. nov. | Tekstur: 1. Mós. 1,27-28; | bíbliuorð: 1.Mós.1,27a |
| 25. nov. | Tekstur: 1. Mós. 4,1-12+16; | bíbliuorð: 2.Mós.20,13 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




*Nr. 24* *25. november 2018* *78. árg.*

# Gev okkum hvønn dag okkara dagliga breyð

Ikki er lætt at skula liva alt lívið í einum. Ja, ikki ein gang eitt ár í senn. Men undurfult er tað at sleppa at taka ein dag í senn. Dag eftir dag fall manna av himni. Dag eftir dag kunnu vit liva av himmalska breyðinum og liva lív okkara fyri hann. Løtu eftir løtu, andadrátt eftir andadrátt, fet fyri fet – lat tað alt samalt vera í honum.

So taka vit meðni ein dag í senn, og hann syrgir fyri árunum, fyri einum ári í senn.

Gud hevur givið okkum tvey dýrdarrík lyftir fyri dagin. „Sum tín dagur skal tín styrki vera.“ Hetta er tað góða, gamla lyftið. Og so Jesu skilnaðarorð til lærusveinarnar: „Og sí, eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda.!“

Sum tann lítli vatn-eiturkoppurin. Hann fer niður um vatnið í hylinum. Har ger hann sær reiður og fær ungar. Har livir hann sítt egna lív í ljósu atmosferuni, sum hann hevur bygt sær í eini luftbløðru. Tað kann vera nokkso kleimið og ótespiligt rundan um hana – men tað hevur ongan týdning.

Latið so okkum á sama hátt í hesum myrka heimi læsa okkum inni saman við Kristi í tí lítla sirklinum, sum eitur „hvør dagur.“ Har vilja vit bíða eftir honum,“ anda inn ta himmalsku luftina og liva í kærleika hansara.

***„Dagurin í dag er ein løgin dagur. Hann er tín. Gjárdagurin glapp tær av hendi.. Hann fær ikki annað innihald enn tað, tú gavst honum. Morgindagin hevur tú onki lyfti um. Ikki***

***veitst tú, um tú fært hann. Men dagurin í dag, er tað einasta, tú kanst vera vísur í. Hann kanst tú fylla við hvørjum, tú vilt. Nýt hann!“***

# At tala satt

*Sannførir í kærleika. (Ef.4,15).*

Tosað verður, plaga vit at siga. Ja, tosið fer víða, og mangan so langt burtur, at tað finnur ikki heim aftur. Tos kann vera vandamikið. Tá ið vinfólk sita saman og hugna sær, verður ikki altíð hugsað um at vanda sær um tosið – har verður pyntað, og har verður minkað um, so úrslitið verður, at ongin lítur á tað, ein sigur – tí tað er bara tað bera tos.

Vit skulu vera sannførd í kærleika – eisini í tosi. Serliga skulu vit hugsa um slatur, hesa ótespiligu lokplantu, sum smíkir seg inn um allar girðingar, festir rót, og illa ber til at tálma ella týna. Rætt er tað, sum sagt verður: Um kanska okkurt er satt, er tað ikki vist, at tað er satt, at tað skal verða sagt. Eg havi kent eina tignarliga, gamla konu, sum altíð tálmaði smettusøgum, við tað at hon legði dent á hitt góða í fólkinum, sum smettusøgan snúði seg um. Hon umbroytti slatur til tøgn.

Tað er góðgerð at savna alt hitt góða saman, sum sagt kann verða um eitt menniskja – so verður smettusøgan pettað sundur.

*t.* týddi.

# Kavabólturin

Nakrir dreingir høvdu gjørt ein kavabólt, og rullaðu nú aftur og fram við honum. At enda gjørdist kavabólturin so stórur, at teir ikki longur fingu vikað honum.

Soleiðis er tað eisini við stúranum okkara segði høvundurin Christian Schriver fyri 350 árum síðani. Í sær sjálvum kunnu stúranirnar vera smáar og týdningarleysar; men vit trúgva so lítið og eru so ótolin, at vit beistast runt við teimum, og at enda eru tær vorðnar so stórar, at vit fáa ikki vikað teimum. „Harri,“ biður Christian Scriver, „eg fari aldri at rulla stúranir mínar longri enn yvir til tín!“

Tað er rætt hugsað! Vit kunnu leggja stúranir okkara yvir á Jesus. Gjarna tveita, rulla ella bólta tær yvir til hansara. At

stúra er nyttuleyst. Tí spyr Jesus: ***„Men hvør tykkara kann við at stúra leggja eina alin aftur at at ævi síni?“*** (Matt.6,27).

***Tá um lívsins bylgjuhav***
***síðsta ódnin ríður av,***
***tá ið brýtur fyri stavn,***
***tá eg tekki sælu havn,***
***Jesus kæri, styrk tá meg***
***við tí troyst: Eg føri teg!***

# Frelstur við trúgv

*„Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv ...“ Ef. 2,8.*

Bíblian sigur: „Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guds gáva.“ Tað er bara við trúnni á Kristus, at vit fáa fulla vissu um Himmalin.

Skaldið Henry van Dyke sigur tað soleiðis: Eg standi niðri í fjøruni. Ein slupp breiðir síni hvítu segl í morgunlotinum og siglir móti tí bláa havinum. Hon er ein mynd upp á vakurleika og styrki. Eg standi og hyggi at henni, til hon tykist at vera sum eitt lítið hvítt skýggj, har sum havið og himmalin koma saman í eitt. Onkur undir liðini á mær sigur: „Hon er horvin!“ – „Horvin, hvagar?“ Úr míni eygsjón. Tað er alt. Hon hevur líka so stóra mastur og líka stóran skrokk, sum hon hevði, tá ið hon helt til havs. Hennara stødd minkaði í mær, ikki hjá henni sjálvari. Og beint í teirri løtuni, har onkur sigur: „So, nú hvarv hon!“ Tá eru tað onnur eygu, sum síggja hana koma, og aðrar røddir møta henni við glaðum rópum: „Her kemur hon!“ Soleiðis er tað at doyggja.“

Kanska sigur tú: „Eg eri ikki uppaldur í kirkjuni. Hvagar skal eg fara fyri at finna trúnna?“ D. L. Moody segði: „Eg bað um at fáa trúgv og ímyndaði mær, at hon fór at koma sum eitt snarljós. Tað tóktist ikki, sum tað fór at henda. So las eg ein dagin í 10. kap. í Rómverjabrævinum: „So kemur tá trúgvin av tí, sum verður hoyrt; men tað, sum verður hoyrt, kemur gjøgnum orð Krists.“ (Róm. 10,17) Eg hevði latið Bíbliuna aftur og hevði biðið um at fáa trúgv. Nú læt eg Bíbliuna uppaftur og fór at granska hana – og síðani tá er mín trúgv vaksin.“

Kanska sigur tú so: „Men eg veit ikki, hvussu tú biður.“ Sig bara heilt einfalt: „Harri Jesus, eg seti mítt álit á teg í dag og taki ímóti tær sum mínum persónliga Frelsara.“

Hevur tú biðið ta bønina? Ja, so ert tú „frelstur við trúgv“.

*„... et Ord til Dagen“* *Effie Campbell* umsetti.

# Harrin lati andlit sítt lýsa yvir okkum

*Harrin talaði framvegis við Móses og segði: „Harrin vælsigni teg og varðveiti teg! Harrin lati andlit sítt lýsa yvir teg og veri tær náðigur! Harrin lyfti upp ásjón sína yvir teg og gevi tær frið!“ 4. Mós. 24-26.*

Líka so nívandi og ólukkuligt tað er, tá ið Gud fjalir andlit sítt fyri okkum vegna misbrot okkara, okkara ókenda og ósannkendu synd og skuld, líka so vælsignað lukkuligt er tað, tá ið Gud letur andlit sítt lýsa yvir okkum. Tá hava vit Guds tokka. So er søkin millum okkara og Guds í lagi, og hjartað kann treystliga frøa seg um hansara miskunn og náði.

Líka frá fyrndini í Guds-fólksins søgu er stórur dentur lagdur á hetta, at Guds andlit skuldi lýsa yvir fólk okkara og yvir hin einstaka. Bara í ljósi Guds andlits eru frelsa og friður, greidleiki og vegleiðing.

Tað man hava verið undarliga bergtakandi, tá ið savnaður Ísraels fyrstur steig fram, og Áron í Guds stað lýsti signingina yvir tey øll, meðan tey í eyðmýkt boygdu seg fyri hinum almáttuga Gudi. Undarliga gleðiliga man tað hava ljóðað, og soleiðis er tað enn, tá ið vit lýða á í trúgv:

„Harrin vælsigni teg og varðveiti teg! Harrin lati andlit sítt lýsa yvir teg og veri tær náðigur! Harrin lyfti upp ásjón sína yvir teg og gevi tær frið!“

*t.* týddi.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2. des. | Tekstur: | 1. Mós. 6,9-22; 7,6-7 + 17+21 | bíbliuorð: | 1 Mós. 6,22 |
| 9. des. | Tekstur: | Jes. 7,14+9,6; | bíbliuorð: | Jes. 9,6a |
| 16. des. | Tekstur: | Luk. 1,26-38 | bíbliuorð: | Luk. 1,28 |
| 23. des. | Tekstur: | Luk. 2,1-20 | bíbliuorð: | Luk. 2,10-11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74